# Umskipan av Farmaleiðum

**Samgongan hevur ætlanir um at umskipa Farmaleiðir, sum vit kenna tær í dag. Hugt verður eftir, um partar av virkseminum kunnu niðurleggjast**

FARMALEIÐIR
*Edvard Joensen*



*Samgongan hevur sett sær fyri at kanna virksemið hjá Farmaleiðum og møguliga at gera broytingar, har sum tað verður hildið neyðugt. Men talan verður avgjørt ikki um at leggja tænastuna niður soleiðis yvir ein kamb, sigur Henrik Old, løgtingsmðaður*

Samgongan er samd um at kanna, um Farmaleiðir er ein forrætning, sum ber seg. Um ikki skal ein umskipan av virkseminum fara fram.

Nú er tað ikki so, at Farmaleiðir bara verða avhøvdaðar, um kanningin vísir, at raksturin ikki er nøktandi. Tað ber ikki til, sigur Henrik Old, løgtingsmaður. Tí Løgtingið hevur skyldu at halda flutningsleiðir til ávís støð í landinum.

– Men samgongan er samd um at kanna, um virksemið í eitt nú miðstaðarøkinum er relevant, og um tað ber seg, sigur hann.

Hetta arbeiðið er ongan veg komið sum so, sigur Henrik Old. Tað verður ikki nakað við, at Farmaleiðir verða niðurlagdar ella umskipaðar á nýggjárinum. Verri enn so, leggur hann dent á.

Tað er soleiðis, at í ávísum førum er líkt til, at fyritøkur og stovnar í eitt nú miðstaðarøkinum tykjast hava funnið útav, at tað er bíligari at brúka Farmaleiðir til flutning, enn at hava sítt egna flutningstól.

– Tað er í lagi, so leingi Farmaleiðir eisini fáa nakað burturúr, sigur løgtingsmaðurin. Men vísir kanningin, at Farmaleiðir hava hall av hesum, so er bara eitt at gera, og tað er at steðga tí partinum.

Men ansast má øgiliga væl eftir, hvussu hetta verður gjørt, sigur hann, og nevnir ymsar møguleikar, sum eiga at verða kannaðir. Millum annað, um Farmaleiðir skulu hava skyldu at flyta farm allan vegin frá veitara til brúkara, ella um tænastan skal fevna um flutning millum tvær miðstøðir, til dømis á bryggjuni í Klaksvík og í Havn, soleiðis at veitarin á Viðareiði letur vøruna inn í Klaksvík, og brúkarin á Velbastað kemur til Havnar eftir henni ella sjálvur syrgir fyri, at hon verður flutt til Velbastaðar, sigur Henrik Old.

– Vit mugu vera vís í, hvat vit gera, og syrgja fyri, at vit ikki bara koma við onkrari tilvildarligari loysn, sum kanska um eini tvey ár endar aftur í tí sama, sum vit hava nú, sigur Henrik Old, løgtingsmaður. Her skal farast grundiga fram, og tað er heilt víst, at her verður so eingin kollvelting á nýggjárinum. Tað einasta, samgongan er samd um enn, er at virksemið skal kannast, og verður tað so neyðugt við broytingum, verða tær gjørdar. Men hvørjar tær verða, vita vit einki um enn, sigur hann.

# Amin kemur aftur til Føroya

**Stóri danski undirhaldarin, Amin Jensen, sum á ólavsøku í ár fyri fyrstu ferð vitjaði í Føroyum, kemur aftur til Føroya komandi vár**

UNDIRHALD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Teir flestu føroyingar kenna óivað Amin Jensen frá undirhaldssendingini Hit med Sangen, sum eisini verður víst í Sjónvarpi Føroya. Tá ið danin vitjaði í Føroyum á ólavsøku, hevði hann eina framførslu í ítróttarhøllini á Hálsi, har fitt av fólki var og vandi sær láturvøddarnar.

**Dámdi serstakliga væl**

Nú er so greitt, at Amin Jensen kemur aftur til Føroya í vár, og hann skal hava eina framførslu, ið verður leygarkvøldið tann 9. apríl. Hesaferð verður tað tó ikki í Havn, at danin fer at undirhalda. Framførslan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, so talan er um eitt rættuliga avmarkað tal av fólki, ið sleppa inn at síggja danska undirhaldaran.

Spurdur hvussu tað ber til, at hann kemur aftur til Føroya, sigur Amin Jensen. - Mær dámdi serstakliga væl í Føroyum, og eg segði við Jákup Jacobsen (ið tók sær av dananum undir vitjanini), at eg var áhugaður í at koma aftur á vitjan. Jákup hevur síðani roynt at laga umstøðurnar soleiðis, at tað ber til hjá mær at koma aftur, og at tað kanska hanga saman fíggjarliga, greiðir Amin Jensen frá.

Fyrst í komandi ári fer


*Kendi danski undirhaldarin, Amin Jensen, kemur aftur til Føroyar komandi vár. Tá fer hann at undirhalda í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.*

*savnsmynd*

Amin Jensen á rundferð í Danmark við nýggja showinum hjá sær, ið hann rópar "Blæs på DK". Henda rundferðin endar við, at leiðin gongur til Føroya at undirhalda í Mentanarhúsinum. Amin Jensen sigur, at føroyingar skulu ikki stúra fyri, at hann fer at verða útbrendur á vitjanini í Føroyum, heldur tvørturímóti. - Talan verður allarhelst um seinastu framførsluna á rundferðini, og tá plagar vanligani okkurt eyka at verða gjørt burturúr, sum annars ikki hevur verið partur av vanligu framførsluni, sigur hann.

Amin Jensen kemur ikki einsamallur, tá ið hann vitjar. Við sær hevur hann eisini ein tónleikabólk undir leiðslu av navnframa Jens Krøyer, sum nógv óivað eisini kenna aftur frá Hit med Sangen.